# RÁS2 ÚR LONDON

TRYGD hugsar um teg.

ATLANTIC AIRWAYS

## Í FÝRA DAGAR SENDIR RÁS2 ÚR STØRSTA METROPOLINUM Í EUROPA

Toasð verður við føroyingar, sum búgva og virka í London, og vit hitta eisini bretar á máli um lív og levnað í London. Vit fara eisini út gøturnar í London og lodda dýpið.

### Cap Dan í Heathrow



Hann starvast millum mongu flogførini í Heathrow floghavnini og hevur búð í enska høvuðstaðnum í fleiri ár. Dánjal Rein greiðir frá, hvussu arbeiðslagið er á einum av heimsins størstu flogvøllum, og hvussu tað er at hava føroyskan samleika í einum av heimsins størstu metropolum.

### Steypafinalur í flogbólti



Seinnapartin leygardagin verða steypafinalurnar í flogbólti. Hjá kvinnum møtast SÍ og Dráttur klokkan 13.30 og hjá monnum Mjølnir og SÍ klokkan 15.30. Vit byrja at senda longu klokkan 13 og halda á, til liðugt er. Hilmar Jan Hansen fer at varpa báðar dystirnar út og eisini verður pláss fyri samrøðum og øðrum áðrenn og millum dystirnar.

## Skráin hjá Rás2

### Mikudagur 17. feb.

15:00 Tíðindi
15:15 Seinnapartur í London
16:00 Tíðindi
16:10 Seinnapartur í London
17:00 Tíðindi
17:20 Tónleikur
18:30 Tíðindi (e)
18:45 Tónleikur
19:00 Mótavika í Keypmannahavn
00:00 Liðugt

### Hósdagur 18. feb.

07:00 Tónleikur
09:00 Morgunsending - live úr London
11:00 Tíðindi
11:15 Morgunsending - live úr London
12:00 Tíðindi
12:20 Hitttónleikur
13:00 Ynskiløtan
14:00 Lýsingar
14:05 Ynskiløtan
15:00 Tíðindi
15:10 Seinnapartur í London
16:00 Tíðindi
16:10 Seinnapartur í London
17:00 Tíðindi
17:20 Tónleikur
18:30 Tíðindi (e)
18:50 Tónleikur
00:00 Liðugt

### Fríggjadagur 19. feb.

07:00 Tónleikur
09:00 Morgunsending - live úr London
10:00 Lysingar
10:10 Morgunsending - live úr London
11:00 Tíðindi
11:15 Morgunsending/Firmakapping Føroya Koyrilærarafelag og Radioservice í Vági
12:00 Tíðindi
12:15 Hittónleikur
13:00 Ynskiløtan
15:00 Tíðindi
15:10 Varpið – Heri Simonsen leggur til rættis
16:00 Tíðindi
16:05 Varpið
17:00 Tíðindi
17:15 Tónleikur
18:30 Tíðindi (e)
18:50 Tónleikur
00:00 Liðugt

### Abbin hjálpti henni at keypa gittar



Sum 14 ára gomul hevði Emma Tricca gott eyga á gittaranum hjá systkinabarni sínum, sum hann hevði fingið í føðingardagsgávu. Men hann vildi ikki læna henni gittaran, hóast hann ikki brúkti gittaran. Tá ið hon fylti 16 ár gav abbi hennara henni pengar, so hon kundi keypa gittaran frá systkinabarninum. Síðani hevur hon vunnið fram sum fólkatónleikari. Hon hevur verið á konsertferð í Bretlandi og aðrastaðni í Europa, og hesa vikuna fer hon at spæla live á Rás2.

### Bilradio

Av tí at Rás2 sendir beinleiðis úr London alla hesa vikuna, er sendingin Bilradio útsett til hósdagin 25. februar kl. 16.10.




RÁS 2



COPENHAGEN FASHION WEEK
Í KVØLD KL. 19

### Mótavika í Keypmannahavn

Í kvøld kl. 19 verður mótasendingin endursend. Størsta mótavikan í norðurevropa er júst farin aftur um bak, og á henni luttóku m.a. tríggir føroyskir sniðgevar og Rás2. Hoyr hvat føroyskir innkeyparar leita eftir, tá teir eru á messu, hoyr hvat verður smart komandi heyst/vetur, og hoyr prát við føroysku sniðgevarnar á Copenhagen Fashion Week.

Sendingin var fyrstu ferð send mánadagin og tað er Eydna Skaale, ið skipar fyri.